Sosialurin

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

Canal+Film1 • Fríggjadagin kl. 19.00

## The New World

Poetiski filmurin hjá Terrence Malick um europisku búsetingina í Amerika, har nýbyggjararnir hitta tey innføddu. Tað var her, at víðgitna ástarbandssøgan millum bretska John Smith og indianaprinsessuna Pocahontas fór fram.

# VARPIÐ



Kanal5 • Mána- týs- og mikukvøldið kl. 20.00

## Back to the Future

Fantastiska tíðarferðin hjá Marty McFly og Doc Emmet Brown gjørdust sannir kult-filmar á sinni. Kanal 5 sendir allar tríggjar partarnar trý kvøld á rað. So tað ræður um at spenna trygdarbeltini í umbygda DeLorean bilinum, tá hesin ferðast aftur og fram í tíðini.



TV3 • Mikudagin kl. 21.00

## Identity

Tá tíggju persónar eina myrka nátt enda á sama motelli, eru tey øll takksom fyri, at tey sluppu undan ódnarveðrinum. Brádliga doyr ein fyri og annar eftir, og so eru tey, sum eru eftir, skjótt greið um, at tað als ikki er av tilvild, at tey øll eru enda á sama stað hesa náttina.

FRÍGGJADAGUR 22. JUNI 2007

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið